ítróttur

Nr. 65 • hósdagur • 7. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ítróttarstjórin í FCK í øðini

**Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóri í FC Keypmannahavn, gjørdist í øðini, tá ið eitt norskt blað týskvøldið avdúkaði ein loyniligan og ólógligan fund millum hann og norska áleyparan Frode Johnsen í Bergen. Holmstrøm gjørdi ikki mætari enn at leypa á myndamannin hjá norska blaðnum**



FCK-GØLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Saman við Frode Johnsen og umboðsmanninum hjá norska áleyparanum sat Niels Christian Holmstrøm og fekk sær ein bita á eini lítlari matstovu í Bergen týskvøldið, tá ið ein blaðmaður og ein myndamaður frá lokala blaðnum, Bergens Tidende, kom innar í matstovuni og spurdi, um teir kundu taka eina mynd av teimum. Hetta var sýtt, og sambært monnunum frá Bergens Tidende gjørdist hýrurin í matstovuni so mikið spentur, at teir valdu at fara út um at bíða.

### Sparkaði myndamannin

Trupulleikin er tann, at Frode Johnsen hevur meiri enn eitt hálvt ár eftir at sáttmála sínum við felag sítt Rosenborg, og tí hevur hann ikki loyvi til at hava samband við onnur feløg, uttan so at viðkomandi felag fyrst vendir sær til Rosenborg. Tað hevði Niels Christian Holmstrøm og FCK ikki gjørt, og tí var fundurin teirramillum ólógligur, og FCK kann vænta sær harða revsing frá avvarðandi myndugleikum.

Fyri at gera skaðan enn verri, var atburðurin hjá Niels Christian Holmstrøm mótvegis myndamanninum hjá Bergens Tidende, tá ið danin kom út av matstovuni so ógvusligur, at ítróttarstjórin verður meldaður til norsku løgregluna.

Frode Johnsen og umboðsmaður hansara komu fyrst út av matstovuni, men teir grettu ikki orð yvir fyri blaðmanninum og myndamanninum, sum avmyndaði teir. Løtu seinni kom ítróttarstjórin í FCK út, og tá ið myndamaðurin royndi at avmynda Niels Christian Holmstrøm, gjørdist danin frá sær sjálvum. Hann legði eftir myndamanninum og sparkaði hann, og harumframt breyt hann eisini blitzið hjá honum.

Nú hevur Bergens Tidende gjørt av, at teir melda danska ítróttarstjóran til norsku løgregluna.

### Ikki gott fyri Toda

Sjálvsagt eru tað ikki góð tíðindi fyri FCK, at ítróttarstjórin í FCK sýnir slíkan atburð, men fyri Toda Jónsson eru tíðindini helst enn verri, tá ið havt verður í huga, hvørji ørindini hjá Niels Christian Holmstrøm vóru í Bergen.

Fundurin við Frode Johnsen og umboðsmann hansara kunnu bert tulkast sum eitt tekin um, at FCK ætlar sær 31 ára gamla norska álopsmannin. Hetta bendir á, at leiðslan í FC Keypmannahavn ikki er serliga áhugað í at leingja sáttmálan við Toda Jónsson, sum tískil kann rokna við at verða fríttstillaður í summar.

Í løtuni er Todi nummar fimm í røðini av teimum fimm áleyparunum hjá danska meistaraliðnum, og tí er hann allarhelst tann, ið fyrst verður vrakaður, um FCK ognar sær Frode Johnsen.

# Greiður neistasigur

**Kvinnurnar hjá Neistanum vunnu týskvøldið ein tryggan sigur á Kyndli, tá ið liðini hittust í einum framskundaðum dysti í Sunset-kappingini**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bæði venjarin hjá Kyndli og venjarin hjá Neistanum hava alment sagt, at teir fegnir vilja framskunda so nógvar dystir sum gjørligt fyri at gera enda á kappingarárinum sum skjótast, og dysturin týskvøldið skuldi eftir ætlan verið leiktur á seinasta leikdegnum, sum er 30. apríl.

### Eingin ivi

Tað var ongantíð nakar ivi um, hvagar stigini fóru, tá ið Kyndil og Neistin dystaðust, tí munurin á liðunum báðum er stórur. Neistin er væl sterkari enn grannarnir og hevur ein nógv breiðari hóp enn tær grønu.

Hetta sást eisini aftur úti á vøllinum, har Neistin tók leiðsluna beinan vegin, og í veruleikanum var dysturin longu avgjørdur, tá ið einans eitt korter var leikt, tí tá var Neistin á odda við sjey málum.

Nú kappingin er avgjørd, og hvørki av liðunum báðum hava nakað serligt at spæla fyri, valdu báðir venjararnir eisini at geva øllum spælarunum fitt av spælitíð, og hjá Neistanum merkti hetta, at so at siga allir útileikararnir komu á máltalvuna.

**Kyndil-Neistin 14-29 (6-12)**
Kyndil: Randi Wardum 5, Linda Weihe 3, Kari-Ann Petersen 2, Ronja M. Mikkelsen 2(2), Hildur Høghamar 1, Halla Midjord 1
Neistin: Ása á Neystabø 8, Simona Petersen 5, Annika Thomsen 3, Lív Sørensen 3, Unn Kragesteen 3, Mia Káradóttir 2, Marjun Tróndarson 2(1), Kára á Dunga 1, Maria Dahl 1, Lív Reynheim 1
Brotskøst: Kyndil 3(2), Neistin 2(1)
Útvísingar: Kyndil 2
Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen
Áskoðarar: 12

# Enn ein norsk steypafinala til Rúna

**Føroya fremsti flogbóltsspælari, Rúni Weihe, skal aftur í ár royna seg í norsku finaluni við liði sínum Tromsø BK**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Aftur í ár ger Rúni Weihe og lið hansara Tromsø BK vart við seg í fremstu røð í norskum flogbólti. Í fjør vann liðið norsku greipuna, og nú hava teir tikið fyrsta stigið á leiðini móti at endurtaka bragdið aftur í ár.



*Rúni Weihe og Tromsø BK er annað árið á rað í finaluni í norsku kappingini*

*savnsmynd*

### Vunnu sannførandi í hálvfinaluni

Seinnu hálvfinalurnar í norsku landskappingini vóru leiktar um vikuskiftið, og mótstøðuliðið hjá Tromsø var Randaberg.

Fyrra hálvfinalan var leikt herfyri, og tá vann Tromsø á útivølli 3-0, og útgangsstøðiði var tí gott undan seinnu hálvfinaluni. Á heimavølli var heldur eingin slingur í valsinum, og Tromsø BK vann enn einaferð 3-0.

Sostatt hevur havnarmaðurin góðan møguleika fyri at gerast norskur flogbóltsmeistari annað árið á rað, og tað hevði verið eitt satt bragd